## NØVN Í VIKUNI

### Jóhan Petur Petersen 75 ár



Í morgin, sunnudagin 19. august, verður Jóhan Petur Petersen við Norðskála 75 ár.

Jóhan Petur førdi handilin hjá Aksel Petersen, pápanum, víðari og hevur annars tikið lut í vinnulívinum har á leiðini. Hann var eitt skifti stjóri á flakavirkinum á Eiði.

Hann hevur verið bygdarráðslimur og skrivari var hann í mong ár í Sunda kommunu.

Postin hevur Jóhan Petur borið í mong ár – eitt álitisstarv, sum var har í húsinum.

Hann hevur sitið í landsnevndini hjá Sjálvstýrisflokkinum og er limur í landsnevndini hjá IOGT.

### Gunhild Rasmussen 85



Í dag, 18. august, verður Gunhild Rasmussen, Gl. Køge Landevej 146, st. th. 2500 Valby, 85 ár.

Gunhild er fødd og uppvaksin í Havn. Hon var dóttir Fíu, sum var úr Funningi, og Jóan Hendrik Egholm í Havn. Hon var yngst av 11 systkjum. Hon flutti niður blaðung og giftist Holger Bernholt Rasmussen. Hann doyði í 1997. Tey fingu seks børn, tvey teirra, Bjarni Rasmussen og Henni Ellefsen, búgva í Føroyum, meðan og hini fýra, Ejvind Rasmussen, Edith Egholm Nielsen, Anna Rasmussen og Peter Rasmussen, búgva í Danmark.

Gunhild og Holger komu heim til Føroya við fyrsta bátinum eftir kríggið, og búðu tey her til 1951. Meðan tey vóru her, arbeiddi Holger hjá Wenzel Petersen.

Gunhild hevur vitjað nógv heima í Føroyum, meðan hon búði í Danmark. Seinast var hon at síggja í summar, tá hon m. a. var í 100 ára føðingardegi hjá systkinabarninum, Mallu, úr Funningi, sum nú býr á Eiði.

# Ítróttarháskúli og øki til frælsan ítrótt í Hoydølum

**Heðin Mortensen skjýtur upp at gera økið við studentaskúlan í Hoydølum til ítróttarøki burturav, og hevur í hesum sambandi sett mentamálaráðharranum ein fyrispurning**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*

– Tekur landsstýrismaðurin undir við í framtíðini at skipa økið við studentaskúlan í Hoydølum sum ítróttarumsiting, ítróttarháskúla og breytir til frælsan ítrótt?

Hetta vil Heðin Mortensen, løgitngsmaður Sambandsfloksins, hava landsstýrismannin í mentamálum, Óla Holm, at svara.

Heðin Mortensen sigur, at ætlanin er at flyta studentaskúlan úr Hoydølum og út í skúladepilin úti í Marknagili. Hetta verður ikki fyrsta dagin, men eftir eini skipaðari ætlan, ið fer at taka nøkur ár.

– Men tað er neyðugt longu nú at hava eina greiða, skipaða ætlan fyri økið, tá tað gerst tøkt, heldur hann.

Hann sigur, at tann skipaði ítrótturin við ítróttarsambandi, sersambondum og útbúgving krevur góðar hølisumstøður. Serliga við altjóða luttøku økjast krøvini. Ítrótturin má hava eina vælvirkandi umsiting. Ítrótturin má kunna hýsa altjóða fundum. Umstøður mugu vera at útbúgva okkara egnu venjarar, ítróttarleiðarar og onnur á nøktandi hátt.

– Til hetta krevjast góðar hølisumstøður til ráðstevnur, skeiðvirksemi og umsiting, heldur hann, og sigur, at føroysk ítróttarfólk eru von at fara út um landoddarnar á ítróttarskúla. Kunnu føroyingar bjóða slíkan háskúla fram á jøvnum føti við aðrar, fara útlendingar at koma hendavegin. Hetta skapar inntøkur, umstøður at venja og kunnleika til Føroyar.

Frælsi ítrótturin er ein tann ringast viðfarni limurin í føroysku ítróttarfamiljuni. Frælsa ítróttinum tørvar rennibreytir og aðrar vøllir. Slíkar umstøður mugu vera ymsastaðni í landinum, men sjálvsagt eisini í høvuðsstaðarøkinum.

Heðin Mortensen sigur, at hesi trý virkisøkini kunnu ikki nøktast í Gundadali, har ítróttarøki er í dag:

- Nøktandi umstøður hjá skipaða ítróttinum.
- Høli og vøllir til ítróttarháskúla og skeiðvirksemi.
- Breytir og vøllir til frælsan ítrótt.



*Heðin Mortensen vil hava at vita, um Óli Holm, mentamálaráðharri, tekur undir við einaferð í framtíðini at skipa økið við studentaskúlan í Hoydølum sum ítróttarumsiting, ítróttarháskúla og breytir til frælsan ítrótt*

Hann vísir á, at í løgmansrøðuni verður tørvurin á hóskandi umstøðum umrøddur. Millum annað verður sagt um limaskap í altjóða olympisku nevndini, sum Føroyar vónandi fáa:

"Í tí sambandi verða krøvini til ítróttaranlegg og venjingarumstøður hjá eitt nú frælsum ítrótti munandi økt."

– Umsóknin um limaskap verður viðgjørd í hesum døgum. Skal áhugin hjá mentamálaráðharranum verða annað enn orð, og skal tað eydnast Føroyum at vinna limaskap, mugu hesi viðurskifti vera í lagi ongantíð ov skjótt, sigur Heðin Mortensen.

Hann heldur, at um landsstýrismaðurin í mentamálum tekur undir við hesi ætlan, ber tað til hjá ítróttinum í Føroyum, landsstovnum og kommunum at leggja hesa ætlan í góðari tíð.






# Ráðstevna um sálarsjúku

**Í døgunum 30. august til 1. september er norðurlendsk ráðstevna um sálarsjúku í Norðurlandahúsinum. 400 luttakarar eru úr øllum Norðurlondum**

SÁLARRØKT
*Eirikur Lindenskov*

Í næstum verður stór ráðstevna hildin í Norðurlandahúsinum, nevnd »Familjan – ein møguleiki ella ein forðan«.

Tað eru Føroyskar Psykiatriskar Sjúkrasystrar, FPS, sum skipa fyri ráðstevnuni. Eini 400 fólk verið við, og eru tey psykiatriskar sjúkrasystrar og onnur fakfólk, ið eru knýtt at psykiatriini í øllum norðurlondum.

Ráðstevnan verður hildin annaðhvørt ár, og norðurlondini skiftast um at skipa fyri.

– At ráðstevnan í ár verður hildin í Føroyum, sama ár sum WHO hevur útnevnt sum Altjóða Sálarheilsuár, gevur okkum enn einaferð møguleika at seta ljóst á umstøðurnar hjá teimum sálarliga sjúku,s igur Jóhanna Andreasen, forkvinna í FPS.

Sum heitið á ráðstevnuni í ár ber boð um, verður dentur lagdur á at lýsa viðurskiftini hjá familjuni hjá tí sálarliga sjúka — familjuni, sum higartil ikki hevur verið tikin við í nóg stóran mun.

Endamálið hjá FPS við at lýsa júst hesi viðurskifti er m. a. at fremja fatan og viðurkenning av hesum bólki í samfelagnum.



# Hava steðgað allari skúlahjálp

**Almannastovan hevur onga heimild til at hjálpa børnum í skúlanum, og tí vilja tey ikki halda fram við hesum, sigur stjórin á Almannastovuni**

STUÐULSFÓLK
*Eyðun Klakstein*



*– Vit hava í summar gjørt av, at vit kunnu ikki lata stuðulsfólk, tá tað snýr seg um skúlagongd. Tað er ikki okkara arbeiðsøki, men skúlaverkið, sum hevur ábyrgdina av hesum, sigur Petra Joensen, stjóri á Almannastovuni.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í summar hevur Almannastovan gjørt av, at tey skulu ikki veita stuðulsfólk til børn, tá tað snýr seg um skúlagongd.

Hetta hevur Almannastovan gjørt í summum førum, men tey halda seg ikki hava heimild til hetta, og tí vilja tey ikki halda fram við tí.

– Vit royna at hjálpa, og í summum førum eru vit farin longur, enn vit í grundini skula. Vit hava latið stuðulsfólk til børn í skúla, men tað gera vit ikki longur, sigur Petra Joensen, stjóri á Almannastovuni.

– Vit hava í summar gjørt av, at vit kunnu ikki lata stuðulsfólk, tá tað snýr seg um skúlagongd. Tað er ikki okkara arbeiðsøki, men skúlaverkið, sum hevur ábyrgdina av hesum, sigur hon.

### Vónleys støða

Í vikuni greiddu vit frá vónleysu støðuni hjá mammu í Klaksvík, sum ikki kann senda spastiska sonin hjá sær aftur í skúla mánadagin, tí hann hevur einki stuðulsfólk fingið játtað.

Drongurin skal byrja í 6. flokki, men sleppur neyvan í skúla mánadagin, tí stuðulsfólkið, sum hann má hava við sær í skúla, er tikið frá honum.

Seinastu árini hevur støðan verið sera ótrygg, tí drongurin hevur havt stuðulsfólk meginpartin av tíðini, men stuðulin er í tíð og ótíð uppsagdur, og mamman hevur tí verið noydd at stríðast fyri skúlagongdini hjá soninum.

### Lógarverkið manglar

Stjórin á Almannastovuni vil ikki gera viðmerkingar til hetta ítøkiliga málið, men hon sigur, at tey hava í nøkrum førum latið stuðulsfólk til skúlagongdina hjá børnum, men hetta kunnu tey ikki halda fram við.

– Lógarverkið er ikki til, at vit kunnu lata stuðulsfólk til skúlagongd. Hinvegin kunnu vit veita stuðulsfólk uttan fyri skúlan, og tað gera vit eisini, sigur Petra Joensen.

Eisini drongurin í Klaksvík hevur stuðulsfólk uttan fyri skúlan, men hann kann ikki ganga í skúla, um hann ikki eisini hevur stuðulsfólk við sær har.

### Vil hava skil á

Landsstýrismaðurin við almannamálum segði í gjár við Sosialin, at stuðulsfólkaøkið er ein hurlivasi, og at hann vil hava skil á økinum.

Hann heldur, at trupulleikin er, at tørvurin er komin áðrenn lógarverkið, og tí er einki skil á. Lógarverkið fyri stuðulsfólkaskipan manglar, men hon skal nú gerast.

Men hóast gongd nú verður sett á hetta arbeiðið, so eru tað brúkarar og starvsfólk, sum líða undir eini ógreiðari skipan.

Fyrsta uppgávan hjá Almanna- og Heilsumálastýrinum verður at fáa stuðulsfólkini til tilkomin í eina skipan, tí her er eingin heimild at lata stuðulsfólk.

Eini 50 eldri fólk hava stuðulsfólk sum er, men verður lógvarheimild ikki gjørd fyri hesum tilboði, má tað takast aftur.

# Ferðafólkini fingu einki at vita



*Ein ávaringarskipan í flogførunum forðaði fyri, at Føroya-flogfarið hjá Maersk og eitt Braathens-flogfar rendu saman í norskum loftrúmi í farnu viku*

**Fyri einari viku síðani var Føroya-flogfarið hjá Maersk um at stoyta saman við eitt norskt flogfar í norskum loftrúmi**

VANDI
*Eyðun Klakstein*

Fríggjadagin í síðstu viku var vandi á ferð, tá tvey flogfør stevndu beint ímóti hvørjum øðrum í norskum loftrúmi.

Talan var um eitt flogfar hjá Braathens og Føroya-flogfarið hjá Maersk, sum vóru eini 10 sekund frá einum samanstoyti í loftrúminum sunnanfyri Kristiansand.

Flogførini høvdu fingið boð um at flúgva í somu hædd, og tá tey eisini skuldu krossast, gjørdist støðan vandamikil.

### Ávaringarskipan segði frá

Røyken-eftirlitsstøðin, sum fylgir loftferðsluni í økinum, varnaðist ikki, at vandi var á ferð, og tað var ein ávaringarskipan í flogførunum, sum forðaði fyri einum samanstoyti.

Braathens-flogfarið fekk boð um at venda 45 stig og fara 300 metrar upp, og tað forðaði fyri, at flogførini rendu saman.

Sambært norskum loftferðslumyndugleikum vóru einir tríggir kilometrar millum flogførini, og tá talan er um eina ferð upp á 800 km/t hjá báðum flogførunum, svarar tað til eini 10 sekund.

### Fingu einki at vita

Tað vóru um hálvthundrað fólk við flogfarinum hjá Maersk, sum var á veg úr Kastrup til Vágarnar.

Ferðafólkini hjá Maersk fingu einki at vita um tilburðin. Maersk sigur, at tað var tí, at teirra flogfar helt somu hædd og kós alla tíðina, og tí var eingin orsøk at boða ferðafólkunum frá hendingini.

Norsku loftferðslumyndugleikarnir og skaðanevndin skal nú kanna, hvussu tað ber til, at hetta kundi koma fyri. Ein møguliga ábyrgd av tilburðinum skal eisini staðfestast.


